# Magnus Magnussen er formaður í Føroya Handverksmeistarafelag

Mikudagin hevði Føroya Handverksmeistarafelag aðalfund, har m.a. lógarbroytingar og nevndarval vóru á skránni. Lógarbroytingarnar snúðu seg serliga um tillagingar í limagjaldinum, men samstundis vórðu eisini aðrar tillagingar gjørdar í lógunum. Í nevndini sita nú Magnus Magnussen og Jón Danielsen, sum umboða Havnar Handverksmeistarafelag, Jón T. Eliassen, umboð fyri Eysturoyar Handverksmeistarafelag, Eydna S. Mikkelsen, umboð fyri Vága Handverksmeistarafelag, og Anskar Hansen umboð fyri Meistarafelagið í Klaksvík. Aftan á aðalfundin skipaði nevndin seg við Magnus Magnussen sum formanni og Jón T. Eliassen sum næstformanni.



# Rás2 í summarhýri

**- Vit kunnu ikki lova gott veður, men vit kunnu lova nógv undirhald, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2. Johan í Kollafirði og Heri Jacobsen eru millum nýggju summarvertirnar á Rás2**

RÁS2
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Rás2 er nú til reiðar at fara í summarbúna. Nýggjar sendingar koma á skránna, aðrar fara í summarfrí, og nýggir vertir skulu gera gerandisdagin hjá føroyingum hugaligari.

- Vit kunnu ikki lova gott veður í summar, men vit kunnu í øllum førum lova føroyingum gott undirhald á Rás2, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.

Nýggjar sendingar koma á skránna hesa vikuna, og eisini nýggir summarvertir verða at hoyra á Rás2. Heri Jacobsen og Johan í Kollafirði eru millum tey, sum skulu gera føroyska summarið eitt sindur festligari.

- Johan í Kollafirði er tiltikin sum radiovertur. Og nú tingvarpið varð niðurlagt, høvdu vit brúk fyri einum manni, sum kann undirhalda føroyingum líka nógv sum Tobbi, Jenis, Kári og Alfred, so vit hava sent boð eftir Johan í Kollafirði. Hann klárar tó ikki at undirhalda fyri Edmund Joensen, men tað bilar kanska ikki, tí Edmund var ikki so nógv í tinginum, sigur Jonhard Hammer.

## Lova fest og balladu

Seinnapart týsdag verða Johan í Kollafirði og Eyðfinn Drewsen á skránni við nýggjari summarsending, sum uttan iva fer at fáa fólk at smílast.

Seinnapart mikudag ger Rás2 nýggja og stóra livesending, sum verður sent uttandura. Sendingin kallast Vágspop, og tað verða Heri Jacobsen, Mirjam Pætursdóttir og Barbara Holm, sum gera sendingina. Tey senda av torginum, har Nólsoyar Páls standmyndin stendur, og sendingin skal verða garantur fyri fest og balladu, siga tey.

Rás2 heldur fram við morgunsendingunum. Týsmorgun verður Eyðfinn Drewsen vertur fyri serligari festivalsending, og hinar morgnarnar verða eitt nú Eyðun Klakstein, Mirjam Pætursdóttir, Barbara Holm og Heri Simonsen vertir.

## Stevnur og Oyggjaleikir

Rás2 fer eisini at ferðast til tiltøk kring landið. James Olsen, Eyðfinn Drewsen og Heri Simonsen fara at leggja leiðina fram við í býum og bygdum, har summarstevnur og festivalar verða á skránni. Hesa vikuna verður vitjað í Klaksvík í sambandi við Norðoyastevnuna.

Rás2 heldur eisini fram við vælumtóktu ítróttarsendingini 3. Hálvleikur, og fótbóltsfrásagnir verða eisini á skránni í summar.

Rás2 setir síðst í juni kós ímóti Álandi, har Oyggjaleikir verða hildnir, og í eina viku fer Rás2 at senda beinleiðis útvarp úr Álandi.

- Vit ætla at miðja eftir at hava eitt livandi og frískt radio at bjóða føroyingum í alt summar, og vit vóna eisini, at fólk vilja spæla við, sigur Jonhard Hammer, stjóri á Rás2.



*Johan í Kollafirði ger comeback sum radiovertur. Hann fer at hava sending saman við Eyðfinn Drewsen á Rás2 í summar*

*Mynd: Jens Kr. Vang*



*Barbara Holm, Heri Jacobsen og Mirjam Pætursdóttir gera nýggju summarsendingina Vágspop. Sent verður av torginum niðanfyri Miðlahúsið, og tey lova fest og balladu hvønn mikudag*